# Føroyski bústaðar-marknaðurin fastlæstur

**– Fáa vit ein liðiligari bústaðarmarknað verða møguleikarnir at útvega ein bústað, sum hóskar til tørvin hjá tí einstaka størri, tá hugsað verður um aldur, inntøku og førleika, sigur Heðin Mortensen, løgtingsmaður, sum eftirlýsir alternativum íbúðarmøguleikum**

*Turið Kjølbro*



*– Út frá einum skipaðum bústaðarpolitikki eigur stuðul at verða latin til alternativar møguleikar gjøgnum Íbúðargrunnin ella Húsalánsgrunnin, sigur Heðin Mortensen, løgtingsmaður*

Tað vanligasta í Føroyum er framvegis at ogna sær eitt grundstykki og byggja eini stór sethús við kjallara. Men tað eru ung og eldri, sum ynskja sær aðrar bústaðarloysnir. Heðin Mortensen, løgtingsmaður, hevur fingið nógvar áheitanir frá fólki um at skapa fortreytir fyri alternativum íbúðarmøguleikum, og tí legði hann fyrst í farna mánaði á ting fram uppskot til samtyktar, har heitt verður á landsstýrið um at síggja til, at hesar fortreytir verða skaptar.

– Øll ynskja ikki at sita í einum stórum húsum og gjalda til tey alt lívið, men sum er hava tey lítlar og ongar møguleikar fyri øðrum. Ei heldur ynskja tey at seta seg í eina nýggja stóra skuld bara fyri at flyta í okkurt annað, sigur Heðin Mortensen.

Hóast útvegan av alternativum bústaðarmøguleikum er ein kommunal uppgáva, heldur løgtingsmaðurin, at landið eigur at ganga á odda og skapa fortreytir. Tað sparir tað eisini kommununum fyri nógvar útreiðslur í sambandi við ráðgeving og annað.

– Tørvurin á alternativum íbúðarmøguleikum er so ovurhonds stórur, at landið eigur at ganga á odda, eitt nú við at stinga út í kortið ein nýggjan skipaðan politikk á bústaðarøkinum. Tað vil siga skapa fortreytir fyri, at lutaíbúðir, leiguíbúðir, íbúðir til eldri og brekað, sum til dømis sjálvsognarstovnar reka, koma. Íbúðir eiga at verða bygdar soleiðis, at tær nøkta ein og hvønn tørv til eina og hvørja tíð.

– Tað er ongantíð stungið út í kortið, hvørjar møguleikar vit hava. Í so máta eru vit eftirbátur í Føroyum. Hyggja vit til Íslands og Danmarkar, síggja vit eitt nógv liðiligari bústaðarmynstur. Fáa vit ein liðiligari bústaðarmarknað verða møguleikarnir at útvega ein bústað, sum hóskar til tørvin hjá tí einstaka størri, tá hugsað verður um aldur, inntøku og førleika. Út frá einum skipaðum bústaðarpolitikki eigur stuðul at verða latin til alternativar møguleikar gjøgnum Íbúðargrunnin ella Húsalánsgrunnin. Og er ikki nóg mikið av peningi har, eigur løgtingið seta meiri pening í, soleiðis at møguleikar verða til staðar.

Einastu alternativu bústaðarmøguleikarnir, sum eru í Føroyum í dag, er í høvuðsstaðnum. Til dømis á Berjabrekku verða íbúðir bygdar, sum í grundini eru til ein og hvønn tørv. Hesar eru avmarkaðar í tali og fyri langari tíð síðani umbidnar.

Ilt er at siga, um uppskotið verður samtykt í tinginum. Tingfólk funnust undir fyrstu viðgerð at uppskotsstillaranum fyri at uppskotið var ov lítið ítøkiligt og høvdu hug at sláa tað upp í glens.

– Hesi vita ikki, hvussu støðan er og hvat gongur fyri seg í samfelagnum, tá ið tey ikki taka uppskotið í álvara. Tað er ikki mín uppgáva at siga landsstýrismanninum, hvussu hann skal bera seg at við at skapa fortreytir, sigur Heðin Mortensen, sum um uppskotið fellur kortini ikki ætlar sær at helma í, men seinni leggja eitt líknandi uppskot fram á ting.

Málið varð beint í trivnaðarnevndina eftir fyrstu viðgerð.

# www.logir.fo styrkir rættartrygdina

**Fríggjadagin lat landsstýrið upp eitt lógarsavn á alnetinum. Einstaki borgarin kann nú leikandi lætt leita fram á telduskýggjan alla galdandi lóggávu og allar kunngerðir**

LÓGARSAVN
*John Johannessen*

Vanligi føroyski borgarin skal hava innlit í føroyska lógarverkið, samstundis sum hann skal vera kunnaður um, hvat er galdandi rættur.

Tí hevur lógardeildin í Tinganesi tikið stig til at leggja ein dátugrunn út á alnetið, har øll lóggáva í Føroyum og allar kunngerðir eru at finna.

Hetta merkir, at hvør einstakur borgari við atgongd til alnetið kann fara inn á www.logir.fo og kunna seg við galdandi rætt. Hetta, heldur lógardeildin, styrkir um rættartrygdina, samstundis sum tað lættir um umsitingarligu uppgávurnar hjá deildini.

## Jákup Sibbi

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í lógarmálum, var til staðar, tá nýggi lógardátugrunnurin varð tikin í nýtslu. Hann vísti á táttin um Jákup Sibba, sum var fyri órætti og rói um hav til teir høgu harrar at fáa sín rætt. Tað fekk hann ikki. Hann varð gjørdur til láturs og skotin í dintilin.

– Men er hetta í veruleikanum eitt teiti um um Jákup Sibba? Er hetta ikki í veruleikanum ein søga um, hvussu fjar lóggáva kann vera frá tí fólki, hon er galdandi fyri. Ein søga um rættartrygd og valdið hjá myndugleikunum?

– Endamálið við at leggja hendan lógardátugrunnin á alnetið er fyrst og fremst eitt stórt framstig fyri kunning, innliti og vitan í lógarverkið í landinum, segði Høgni Hoydal, landsstýrismaður í lógarmálum

## Størri innlit

Men Høgni Hoydal heldur kortini ikki, at tað er nóg mikið at hava ein lógardátugrunn á alnetinum.

– Tað næsta stigið er at fáa øll rundskriv, sum verða gjørd í stýrinum, inn í dátugrunnin, og síðani ætla vit eisini at fáa týdningarmiklar fyrisitingarligar avgerðir lagdar inn. Hartil verður arbeitt við at fáa allar dómar úr rættinum lagdar inn eisini, gjørdi Høgni Hoydal greitt á fundinum, tá lógardátugrunnurin varð tikin í nýtslu.

Orsøkina til, at hetta skal gerast, segði Høgni Hoydal vera at skapa størri rættartrygd og at gjøgnumføra eitt veruligt alment innlit í fyrisitingina hjá landsins myndugleikum.

DAGFØR
TEG
Sosialurin
HALT
SOSIALIN

Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.

Sosialurin



# Teistin vil teg kalla

**Nýgjasta skipið í flotanum, sandoyarferjan, varð leygardagin doypt á Skála og eitur nú alment Teistin**

SKIPSDÓPUR
*Edvard Joensen*

**Skála:** »Gævi eydnan fylgi tær, tína lívsleið alla. Teg vit goyma hjørtum nær, Teistin vil teg kalla.«

Soleiðis fullu orðini, tá Eydna Djurholm doypti Teistan á bryggjuni á Skála leygardagin.

Tað oysregnar, er mestsum áarføri, tá koyrt verður oman á skipasmiðjubryggjuna á Skála, har hátíðarhaldið verður, nú Teistin skal doypast. Eingin vindur soleiðis. Kortini so, at fløggini standa frá, hóast tey tykjast øgiliga tung, so frágingið út, hóast okkurt smáting tykist mangla enn. So sum okkurt skilti á hurðum og sovorðin smáting, sum einki hava upp á seg.

Men eitt hevur Teistin fram um onnur strandfaraskip. Hann hevur gongubreyt á bildekkinum, og tað er nakað, sum fólk heilt vist fara at gleðast um.

Umleið hálvan metur frá skottinum er kantur, har bilarnir ikki skulu innum. Og við lúkurnar í endunum á skipinum, er garður framvið, so fólk og bilar ikki koma saman, tá tey fara í land. Sera gott fyri gongufólkið, og ikki minni fyri bilarnar. Nú fer helst eisini at sleppast undan at fáa bilin skøvaðan av troðkandi fólki, sum ekur eftir bilsíðuni við taskum og øðr um viðføri.

Tað má í sjálvum sær sigast at vera eitt bragd av Skipasmiðjuni á Skála at fer at lata hurðarnar upp fyri nýggjum arbeiðsdegi á Skipasmiðjuni á Skála. Hóast tann fyrsti fór ikki so langt. Tað var Gunnar Mohr, sum nú er stjóri í móðurfelagnum, Tórshavnar Skipasmiðju.

## Váttligt hátíðarhald

Tað regnar alsamt. Kanska verri. Nógv fólk er nú samankomið. Gumman kom í áðni undir regnskjóli. Eisini í føroyskum búna.

Hornorkestrið er í ferð við at stilla upp á bryggjuni. Nes Sóknar Musikkfelag. Mær tykir synd í teimum og vóni, at teir hava góðar plastikklummar til nótarnar.

Klokkan nærkast ellivu, og Torleif fer fram um orkestrið, veipar einar tríggjar ferðir við dirigentstavinum, og orkestrið trívur í ein marsj.

Tað gongur fínt, og so fer vát tey eru vorðin í dag.



*Fýra stjórar. Frá vinstru: Gunnar Mohr, Jón Danielsen, Marni Olsen og Poul Mohr*

*Mynd: Edvard Joensen*

Fari umborð áhetta nýggja skipið, sum liggur so innbjóðandi har við signalfløggunum uppi.

Lítið fólk er komið enn, so væl ber til at fara runt at síggja skipið, áðrenn ov trongt verður.

Á brúnni eru maskinmenn og navigatørar við at gjøgnumganga seinastu innlæringarnar av onkrum tóli, sum teir skulu brúka í komandi tíð.

Her er ikki so øgiliga nógv, sum minnir um eina góða, gamla skipsbrúgv. Meira at kallla ein teldustova við skíggjum og joystikkum her og har. Men soleiðis er. Alt broytist, og eingin ivast væl um, at hetta er til tað betra. Teir eru í hvussu er spentir.

Fari eitt sindur runt á skipinum. Eitt fín og nossligt skip. Manningarrúm, ferðafólkarúm, bildekk, maskinrúm. Alt sær væl hava fingið hetta skipið liðugt til tíðina undir teimum treytum, givnar hava verið. Tillukku við tí.

## Fráfarandi stjóri

Hitti stjóran á Skipasmiðjuni, Jón Danielsen. Veitsluklæddur í føroyskum búna, sum vera man. At hann er ein glaður maður í dag, sæst skilliga á honum.

Jú, hetta er ein stórur dagur hjá honum. Fyrsta nýbygningin, sum latin er av Skipasmiðjuni í eitt hálvt mannaminni, sleppur hann at avhenda.

Og so er tað samstundis hansara seinasti arbeiðsdagur á Skipasmiðjuni á Skála. Hann byrja í morgin í nýggjum starvi í egnum byggifelag. Eftirmaður hansara eitur Marni Olsen.

So nú Teistin verður latin, verður tað triðji stjórin á Skipasmiðjuni, síðan byrjað varð upp á skipið, sum stjórin á Skipasmiðjuni upp á ein pall og sigur frá, at bara sjálvur dópurin verður uttan fyri í dag. Restin av hátíðarhaldinum verður á dekkinum á Teistanum. Og tí taka fólk væl undir við.

Men gumman, stakkalin, leggur regnskjólið frá sær og fer í sínum fína búna upp á pallin, har hon sigur fram eitt ørindi og sveiggjar eini champagnufløsku, sum fer í knús við brestin. Hornorkestrið spælir fyrsta ørindi av Tjóðsanginum, og fólk syngja við.

Navnið, sum fyrr hevur verið hvítt, er nú vorðið blátt. Teistin er doyptur,og fólk tyrpast at lítlu lúkuni í síðuni á skipinum. Men har er ov trongt, so gronin verður lyft upp, og fólk sleppa umborð tann vegin.

## Fín veitsluhøll

Hornorkestrið er komið umborð og hevur stillað upp afturi í reyv. Tey spæla, og tað ljóðar sera væl her inni á bildekkinum. Onkur heldur við Poul Mohr, skipasmiðjustjóra, um hann nú eisini var farin at smíða konserthallir.



*Teir læra seg at brúka ymsu tólini á brúnni*

*Mynd: Edvard Joensen*

Hátíðarhaldið heldur fram. Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum, Reidar Nónfjall, stjóri á Strandfaraskipum landsins, og Jón Danielsen, frá stjóri á Skipasmiðjuni á Skála, halda røður, har teir greiða frá ymsum viðurskiftum í samband við byggingina av Teistanum. Og hornorkestrið spælir fosturlandsangir millum røðurnar.

Fram við síðunum á bildekkinum eru borð sett upp, har gestirnir kundu fáa eitthvørt til matna. Tá røðurnar eru lidnar, verða fólk biðin um at flyta seg út í borðið, og hilladekkið, har eisini borð standa á, verður lorað niður úr erva. Síðan verða allir gestirnir, sum komnir eruumborð, bodnir til borðs.

Undir borðhaldinum heldur Poul Mohr, skipasmiðjustjóri, røðu, har hann millum annað skemtandi heldur fyri, at hann ivast í nú eina løtu, um Strandferðslan yvirhøvur skal fáa skipið. Hann hevur hug at brúka tað til veitsluhøll sjálvur. Heldur, at hetta er nokk fyrsta veitsluhøli í landinum, har borðini bara verða lorað niður undan loftinum. Tá so liðugt er, er bara at lyfta tey uppaftur og fara upp á gólv, heldur hann.

Borðhaldið er endað, og fólk eru farin runt á skipinum. Her er fólk á báðum stavnum, og eisini á miðuni. Tey hyggja at og gera viðmerkingar. Men øll tykjast væl nøgd og samd um, at hetta er eitt skip, sum bæði Skipasmiðjan, Strandferðslan og sandoyingar kunnu gleðast um.

Boðað er frá, at ein framsýningartúrur verður um eina løtu, so tey mongu, sum ikki eru boðin ella ætla sær við, fara so smátt at sleppa sær í land.

Eitt sindur ótættari eru droparnir nú, men framvegis regnar, so tað er sum skjótast at sleppa sær í bilin.



*Eydna Djurholm doypti Teistan leygardagin*

*Mynd: Edvard Joensen*